## Nógv ferðafólk til Íslands

Altsamt fleiri fólk leita sær til Íslands at ferðast, og árið í ár hevur roynst væl hjá ferðavinnuni. Hagtølini vísa, at níggju teir fyrstu níggju mánaðarnar var ferðafólkatalið góð 16 prosent størri enn somu tíð í fjør. Eitt annað met varð sett í summar, tí í juli og august kom ferðafólkatalið fyri fyrstu ferð nakrantíð upp um 80.000 í einum mánaði. Ein partur av ferðafólkunum til Íslands ferðast við Norrønu, sum eisini setti met á rutuni í summar.



## Færri gistu í Grønlandi

Grønlendsku gistingarhúsini høvdu fleiri vitjandi í summar enn seinasta summar, men tað vóru færri, sum lógu nátt á gistingarhúsunum. Sambært hagtølunum merkir tað, at gistingarhúsinmi høvdu umleið 5.000 færri liggjandi gestir í summar. Í ferðavinnuni verður Grønland býtt sundur í økir, og tølini vísa, at teir flestu gestirnir vitja Miðøkið, sum millum annað umfatar Nuuk. Í Eysturgrønlandi er munandi longri millum tey fremmandu.

# Á Fólkating at samstarva

**Sambandsflokkurin er til reiðar til fólkatingsvalið og bjóðar seg fram sum einasta sambandsflokk í landinum. Teir ætla sær niður á danating at byggja upp, ikki at bróta niður**

FÓLKATINGSVAL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Flestu flokkar eru nú til reiðar at taka dystin til fólkatingsvalið upp, og í morgun hevði Sambandsflokkurin sum tann fyrsti tíðindafund, har hann legði fram valskrá sína.

Formaðurin, Kaj Leo Johannesen, var í tí filosofiska horninum og samanbar ríkisfelagsskapin við ein urtagarð, har vit nú í góð tvey ár hava havt ein urtagarðsmann, ið bert fjálgaði um nakrar fáar plantur, meðan hin mest sáddi illgresi. Nú er Sambandsflokkurin til reiðar at senda ein urtagarðsmann avstað, sum fjálgar um allan garðin.

Valskráin er sett upp í fimm punktum:
Felagsmálini
Fólkatingsumboðanin
Ríkisráðið
Samgonga
Uttanríkisloysnir

Grundarlagið undir ríkisfelagsskapinum eru felagsmálini, sum eru verjumál, uttanríkismál, grundlógin, gjaldoyra, kongshús og rættarskipanin. Og hetta eru málini, sum Sambandið fyrst og fremst vil samstarva um.

Fær flokkurin eitt umboð á fólkating, fer hetta at gera sína ávirkan galdandi í samstarvi við Vinstra, eitt samstarv, sum hevur fleiri enn hundrað ár á baki.

Flokkurin rør samstundis upp undir, at danskir politikarar í størri mun siga sína hugsan um ríkisfelagsskapin, tí felagsskapurin er gróðursettur í, at allir partar tora og vilja hava eina meining.

### Vilja í samgongu

Eitt av málunum, sum Sambandsflokkurin fer at arbeiða fyri bæði á Fólkatingi og á Løgtingi, er eitt ríkisráð, mannað við føroyskum og donskum politikarum.

Ráðið skal hava til endamáls at menna og styrkja ríkisfelagsskapin, og harvið vælferðina hjá føroyingum, sigur flokkurin í valskrá síni.

Men Sambandsflokkurin ætlar sær ikki – eins og hinir flokkarnir, sambært Kaj Leo Johannesen – niður á danating at sita hendur í favn, ella enn verri, at avmontera ríkisfelagsskapin.

- Meðan aðrir flokkar tilvitað vilja fara í andstøðu og rópa seg hásar uttan fyri stjórnarvaldið í Keypmannahavn, fara vit miðvíst eftir ávirkan innan fyri eina samgongu á Christiansborg, førdi Kaj Leo Johannesen fram á fundinum í morgun.

Her verður sambært sambandinum ikki minst hugsað um møguleikarnar hjá vinnulívinum sum heild og serliga innan fyri ES, bæði tá tað ræður um ES-atlimaskap og tey fýra frælsni.

Tá talan er um uttanríkisloysnir, sum er fimta punktið á skránni hjá Sambandsflokkinum, er ikki minst talan um føroyskan sess í ST.

- Danska ríkið eigur seks sessir í ST, og tað er nærliggjandi at hugsa, og eisini fysiskt gjørligt, at føroyingar fáa ein av hesum sessum tá mál eru fyri, sum hava føroyskan áhuga, segði Kaj Leo Johannesen.

Sambandsflokkurin nýtti annars høvið at vísa á, at nú sjálvt Javnaðarflokkurin var farin at fríggja til Norðuratlantsbólkin, sum millum annað hevur til endamáls at loysa frá Danmark, er Sambandið einasta alternativ til føroysku loysingarflokkarnar.



*Hóast Sambandsflokkurin strembar móti javnstøðu á listanum var bert ein kvinna – Ingvør Nolsøe – til staðar, tá flokkurin legði sína valskrá fram í morgun*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Fríðriksson vann trygt

**Áhugin fyri seinna umfarinum av bispavalinum var heldur minni enn til fyrra umfar, men kortini øktist munurin millum Jógvan Fríðriksson og Jákup Reinert Hansen**

BISPAVAL
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Í dag er vaktarskifti á brúnni í nýggju føroysku fólkakirkjuni. Hans Jacob Joensen fer í land og við stýrisvølin stillar seg nú 50-ára gamli Jógvan Fríðsriksson.

Til fyrra valumfar vórðu fimm valevni stillað upp, og tey vóru Jógvan Fríðriksson, Jákup Reinert Hansen, Uni Næs, Bergur Debes Joensen og Marjun Bæk.

**Atkvøðubýtið fall soleiðis út:**
Jógvan Fríðriksson 190
Jákup R. Hansen 72
Bergur D. Joensen 49
Marjun Bæk 45
Uni Næs 35

Tað var sostatt eingin av teimum uppstillaðu, sum fekk meiri enn helmingin av atkvøðunum, og tí mátti umval til millum tveir teir fremstu kandidatarnar, Jógvan Fríðriksson og Jákup Reinert Hansen. Við fyrra valumfar nýttu 391 av teimum 403, sum høvdu atkvøðurætt, høvi at atkvøða.

Seinasta freist at lata inn atkvøðuseðlarnar til seinna umfar var í gjár á miðdegi, og tá talt varð saman, vóru atkvøðurnar 367 í tali, ella 24 færri enn við fyrra valumfar.

### Rørdur Fríðriksson

Fyri at tryggja, at eingin atkvøddi tvær ferðir, vórðu allir brævbjálvar talmerktir. Innkomnir, skrásetti valnevndin øll nummør, samstundis sum hesi vórðu skrødd av brævbjálvunum. Á henda hátt vórðu allar atkvøður skrásettar, samstundis sum tær vórðu gjørdar anonymar.

Fyrstu løtuna tóktist valið at gerast ógvuliga spennandi, tí tá einar 40 atkvøður vóru taldar, lá Jákup Reinert á odda. Men síðani dró Fríðriksson frá, og tá samanum kom, hevði strandaprestur fingið snøggar 250 atkvøður, meðan Jákup Reinert Hansen stóð á 116. Ein atkvøða var blonk.

Sostatt helt tann ábendingin, sum fekst frá fyrra valumfarinum, fram í seinna, og Jógvan Fríðriksson gjørdist en tryggur vinnari.

Eftir at upptalt var, segði fráfarandi bispur nøkur orð, vend fyrst at Jákupi Reinert Hansen og síðani at vinnaranum. Hann gav Jógvani Fríðrikssyni somu orð við á leiðini, sum hann sjálvur hevði fingið frá Eivindi Vilhelm, nevniliga at: » tú fær eingi góð ráð frá mær við á vegnum. Men tørvar tær nakrantíð ráð, ert tú altíð vælkomin«.

Sjálvur var Jógvan Fríðriksson rættiliga rørdur av stóru undirtøkuni, hann hevði fingið.

- Eg havi ongan rætt ella krav upp á nakra atkvøðu. Hetta er ein heiður, ið er vístur mær, sum eg fari at gera mítt ítarsta at liva upp til. Eg dugi ikki alt, og tí ætli eg mær at útinna mín gerning í tøttum samstarvi við prestar og kirkjuráðslimir, føroysku fólkakirkjuni at gagni, segði Jógvan Fríðriksson millum annað við Rás2.



*Í samband við bispaskiftið vildi fráfarandi bispurin Hans Jacob Joensen, ikki geva nøkur góð ráð, men Jógvan Fríðríksson fekk eitt blómutyssi frá honum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*